


Á TV3 í kvøld kl. 19.55

# Ein spurningur um æru



*Tann ískaldi obersturin Nathan R. Jessep (Jack Nicholson)*



*Tom Cruise, Demi Moore, Kevin Pollak*

Tveir marinuhermenn eru ákærdir fyri at hava dripið ein hermann undir einum alt ov harðligum revsitiltaki. Sjóloytnanturin JoAnn Galloway (Demi Moore) fær varhugan av, at revsingin ikki fór fram av egnum vilja hjá teimum báðum ákærdu, men varð framd eftir beinleiðis boðum frá tí harðrenda oberstinum Nathan R. Jessep (Jack Nicholson). JoAnne Galloway er sett sum verji hjá teimum ákærdu, men tó einans sum hjásitari fyri ein av bestu sakførarunum hjá herflotanum, nevnliga sjóloytnantinum Daniel Kaffe (Tom Cruise). Verjarnir báðir hava sera trupult við at arbeiða saman. JoAnne í fyrstuni er sannførd um, at menninir virkaðu undir beinleiðis ordra frá Jessup oberstí, sostatt kunnu teir ikki verða dømdir sekir í manndrápi. Daniel Kaffe er hinvegin einans sinnaður at fáa avgreitt málið skjótast gjørligt. Men eftir at hava hitt tann harða og ískalda oberstin Jessup verður Daniel sannførdur um, at tað er meiri aftanfyri ta drepandi revsingina. Saman stríðast nú báðir sakførararnir, JoAnne og Kaffe, í einum øtiligum stríði ímóti tí valdsmikla Jessup og eini hernaðar skipan, sum í tí dulda virkar við valdi og eftir egnari lóg.

Á TV Danmark týskvøldið kl. 21.05

# C.S.I.



*Gil Grissom, ovastin á C.S.I. (Crime Scene Investigation)*



*Catherine Willows er ógegnig í samband við drápsmálið í hesum partinum av krimirøðini C.S.I.*

Krimirøðin C.S.I. er uttan iva millum tær best umtóktu sendirøðirnar í amerikanskum sjónvarpi og hevur sett fleiri hyggjaramet yviri í statinum - sjálvt endursendingarnar hava sett met. Røðin sendir nú á síni fjórðu sesong og hevur longu givið av sær heilar tvær sendirøðir í somu ætt ella sokallaðar "spin-off" røðir: C.S.I. Miami og hetta heystið verður CSI: NY frumsýnd, hendan røðin fer fram í New York. "Próvtilfarið sigur ikki ósatt", sigur Gil Grissom, ovastin á C.S.I. (Crime Scene Investigation) - kriminaltekniska kanningarstovan hjá løgregluni í Las Vegas. Við dugnaliga liðið sínum er Grissom meistari í at tulka slóðirnar, ið brotsmenn hava latið eftir sær á einum gerningsstaði. Grissom hevur verið í starvinum í 17 ár og er ein garvaður veteranur í fakinum. Undir Grissom arbeiða m.a. Catherine Willows, sum er einamamma, ið alla tíðina er í tvístøðuni, har hon roynir at geva sær stundir til dóttir sín. Warrick Brown hevur eisini ognað stóran part av lívið sínum til arbeiðið á C.S.I., men hann hevur ein veikleika fyri kortspæli og kasino. Sara Sidle er tað seinasta starvsfólkið á stammuni, men hon hevur tað fyri at fylgja sínum egna høvdi og ikki lurta eftir øðrum. Nick Stokes er tann smarti á liðnum og kanska eisini tann mest ambitiøsi av teimum. Hesaferð snýr parturin seg um tveir menn, sum eru funnir deyðir. Teir royndu at síkja seg til eina stór upphædd av peningi frá kasinoum hjá Sam Braun. Hesin Sam er pápi Catherine, sostatt er hon ógegnig, tí verða Grissom og Warrick settir á málið. Millum teir, sum koma undir illgruna er sonur tann eina dripna síkin.



FILMSTEIGURIN

# Man on Fire

John Creasy er fyrrverandi CIA-agentur. Hann er útbrendur og er at kalla farin í hundarnar. Okkurt má hann tó takast við, fyri at vinna til lívsins breyð, so hann sigur ja, tá honum stendur í boði at fara til Mexico City, har hann skal vera lívverji hjá níggju ára gomlu Pita. Foreldur hennara, sum er múgvandi, eru bangin um, at hon skal gerast eitt av fleiri offrum, nú hópur av gíðslaræningum herja landið.

At byrja við orkar Creasy ikki fyri hesi forkelaðu og framligu gentuni. Ikki minst eru støðugu spurningar hennara irriterandi at lurta eftir, men so líðandi verður hann kortini góður við hana.

Ein dagin hendir vanlukkan tó. Pita verður burturførd. Sjálvur er Creasy deyðanum nær, tá gíðslarænararnir skjóta eftir honum, men hann megnar tó at koma fyri seg aftur. Og so setir hann sær fyri, at hann skal hevna seg inn á øll tey, sum vóru atvold til hetta.

Í høvuðsleiklutinum sum John Creasy síggja vit her Denzel Washington. Pita verður leikt av Dakota Fanning, meðan Marc Anthony og Radha Mitchell hava leiklutirnar sum ríku foreldur hennara.





# Catwoman

Síðani hon fyrstu ferð var at síggja filmi saman við Batman, hevur ein farri av loynidómi umgyrt Catwoman. Nú fær hon sín egna film.

Stillføra Patience (Halle Berry) verður myrd, tá hon av tilvild kemur fram á nakað, sum hon ikki skuldi vita. Men hon doyr ikki! Við hjálp av myrkursins kreftum kemur hon aftur til lívs, men hesaferð sum Catwoman. Sterk, fim og við skerpaðum saonsum fer hon nú at royna nýggju kynstur síni. Nú er hon ikki longur stilla gentan, men tann sensuella masku-klædda kettukvinnan, sum jagstrar brotsmenn í øllum býnum.





**Frumsýning**
Fríggjadagin 05.11. kl. $23^{00}$ Leygardagin 06.11. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 07.11. kl. $22^{00}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




**Frumsýning**
Fríggjadagin 05.11. kl. $20^{30}$ Leygardagin 06.11. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 07.11. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 05.11. kl. $19^{45}$ Fríggjadagin 05.11. kl. $22^{30}$
Leygardagin 06.11. kl. $19^{45}$ Leygardagin 06.11. kl. $22^{30}$
Sunnudagin 07.11. kl. $19^{45}$ Sunnudagin 07.11. kl. $22^{30}$




**Frumsýning Fríggjadagin 12.11.**




**Frumsýning Fríggjadagin 12.11.**

**BIO KIOSKIN**
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.